

# Holst fekk av at vita í Århus

Tað gekk illa hjá Lyngby, tá ið oddaliðið í næstbestu donsku deildini vitjaði í Århus í gjár. AGF verður roknað sum helst sterkasta liðið í 1. deild, og í øllum førum var AGF nógv tað betra liðið í dystinum ímóti Lyngby. Úrslitið gjørdist 4-1 til AGF, eftir at liðið hevði verið á odda 4-0 stutt fyri leiklok. Christian Lamhauge Holst spældi allan dystin fyri Lyngby, men hesaferð gekk tað einki serligt hjá Holst og liðfeløgunum, sum tó framvegis liggja fremst í 1. deild.

# Bretar vinna Champions League

Skotski venjarin hjá Manchester Untited, Sir Alex Ferguson, heldur, at tey fýra ensku liðini í Champions League hava góðan møguleika at vinna kappingina í ár.

- Eg ivist ikki í, at Premier League-feløgini verða við til tað síðsta í kappingini. Ensku feløgini betra seg allatíðina, og tí kann eitt av ensku feløgunum saktans vinna, sigur Sir Alex Ferguson.

Umframt hansara egna felag, eru eisini Chelsea, Arseanal og Liverpool við í Champions League í ár. Bólkaspælið byrjar týskvøldið.

# EB/Streymur ætlar sær at vinna FM

Marni Djurhuus, verjuleikari og ein av málskjúttunum hjá EB/Streymi sunnudagin, heldur ikki, at føroya-meistaraheitið er tryggjað, men sigur tó, at málsetningurin er at vinna felagnum fyrsta FM-heitið nakrantíð.

- Nei, FM er á ongan hátt komið í hús. Vit hava fimm dystir eftir, og tað gongur skjótt hvønn vegin. Hinvegin kann eg siga, at vit ætla okkum at vinna FM, men tað krevst so, at vit fáa nakrar sigrar aftrat og tað ætla vit at gera, greiðir Marni Djurhuus frá eftir dystin, sum hann mátti eygleiða frá síðulinjuni seinastu minuttirnar.

Í einum luftdysti rendu hann og ein mótstøðuleikari høvdini saman, og úrslitið var, at Marni Djurhuus skræddi vørrina so mikið, at hann varð seymaður og fekk tvær pentur.

Um dystin annars sigur Marni Djurhuus, at sigurin á ongan hátt var ov stórur og at teir vóru tað betri enn VB/Sumba.

- Vit vóru í hvussu so er hasi málini betri enn VB/Sumba, og høvdu vit eisini møguleikan fyri fleiri málum aftrat. Tá vit hava skorað til 4-0 fáa teir eitt sindur meiri spæl og sindur meiri pláss og skora so eisini, men eg haldi ikki at sigurin var ov stórur, staðfestir Marni Djurhuus, sum longu mikudagin aftur skal í eldin saman við restini av EB/Streyma-liðnum, tá **steypadysturin móti HB skal spælast.**

**-rwd**

Birgir Jørgensen og VB/Sumba høvdu tó meiri pláss nú, enn teir høvdu havt allan dystin annars, og í yvirtíðini fingu teir umsíðir bóltin í netið.

Marni Djurhuus sat uttan fyri, tí hann hevði fingið ein snudd í andlitið, og EB/Streymaliðið var av tí sama ikki væl skipað hesa løtuna. Hetta gagnnýtti VB/Sumba við at flyta bóltin niðan í borðinum, áðrenn hann síðani varð spældur inn í vøllin. Ein skotroynd varð send avstað, men bólturin tók í ein verjuleikara og broytti kós, til púra leysa Birgir Jørgensen, sum við handaru stong lættliga kundi stúta bóltin í netið til endaliga úrslitið 4-1.

Eftir dystin stendur so eftir, at EB/Streymur vann ein rættiliga sannførandi sigur á VB/Sumba. Uttan at fara í smálutir kunnu vit staðfesta, at oddaliðið hevði fleiri stórar møguleikar til fleiri mál, men meðan Sorin Anghel aftur fann leiðina til málið, so átók Arnbjørn Hansen sær leiklutin sum dagsins brennivargur.

VB/Sumba hevði frægastu løtuna í dystinum, tá teir vóru aftur úr við fýra málum, men kundu teir ikki gera nakað sum helst við sannførandi avrikið frá oddaliðnum.

# Spenningur til síðsta sekund

**Eftir ein avsmurning fríggjakvøldið ressaðist Gunnar aftur sunnudagin tá tað eydnaðist honum at vinna landavegkoyringina.**

SÚKKLING
*Tíðindaskriv*

Tað bleiv til nógva súkkling um vikuskiftið. Fríggjakvøldið varð kappast í 40 km einkultstarti og sunnudagin í 90 km landavegkoyring.

Tórshavnar Súkklufelag hevði í ár avgjørt at gera rutuna so flata sum tilber, og tí bleiv teinurin í ár nógv øðrvísi enn hann hevur verið seinastu mongu árini, tá koyrt hevur verið av Toftum, uppum Eiðisskarð, eftir Oyggjarvegnum til Havnar. Upp um dalar og fjøll hini árini, men ikki í ár.

Í ár bleiv koyrt frá Plantusøluni við Hvítanesvegin, gjøgnum berholið til Kollafjørð, til Hvalvík/Streymnes. Har bleiv vent, og leiðin gekk síðan aftur til Havnar gjøgnum berholið.

Komnir til Plantusøluna við Hvítanesvegin gekk leiðin eftir vegnum Yviri við Strond har vent varð við Skansan. Síðan bleiv koyrt niðan til Rundkoyringina við Vegin Langa. Leiðin gekk so oman aftur til Plantusøluna. Hesin teinur skuldi koyrast tvær ferðir áðrenn menn sloppu av súkkluni.

## Torkil væl koyrandi

Aftur sunnudagin var Torkil í essinum. Torkil fór eftir the double, ongin ivi um tað, men Gunnar ætlaði tað øðrvísi. Gunnar ætlaði ikki at kappingin skuldi avgerðast við einum endaspurti, og tí royndi hann fleiri ferðir av avgera kappingina tíðliga, við ferð eftir ferð at stinga av frá feltinum. Men Torkil var væl koyrandi og megnaði hvørja ferð at koyra Gunnar inn aftur.

Gunnar gav kortini ikki upp, men tað gjørdi Torkil heldur ikki. Søgan endurtók seg fleiri ferðir. Móti endanum av kappingini sá tað tó út til at fara at eydnast Gunnari. Niðan úr Hvítanesi gjørdi Gunnar enn eina roynd, og hann fekk eitt gott "hol" aftur til Torkil uppá 50 til 100 metrar. Hendan støðan helt sær leingi, men tá umleið 8 km vóru eftir á mál hevði Torkil fingið Gunnar aftur. Kappingin bleiv tí avgjørd við einum endaspurti, ið Gunnar vann.

Á einum flottum triðja plássi kom Kjartan Egholm á mál, bert 35 sekundir eftir Gunnar og Torkil.

## Miðvís venjing gevur úrslit

Sigmund Olsson hevur, eins og Torkil Veyhe, eisini vant nógv í ár, og hevur hetta nú givið úrslit. Tá menn royndu at sleppa undan hvør øðrum, var tað ikki bara Torkil og Gunnar, ið stríddust. Sigmund taldist eisini millum teir, ið tóku lessið, og ein sá skjótt at eisini Sigmund hevur ment seg nógv í ár. Sigmund er gott eitt ár yngri enn Torkil, og tað er ikki onki tá mann er tannáringur. Miðvísa venjingin hjá Sigmundi í ár hevði við sær at hann kom á mál sum nummar fimm, bert ein minutt og 44 sekundir eftir vinnaran.

Kappingarárið hjá Tórshavnar Súkklufelag er nú um at verða at enda komið. Tey vaksnu eru liðug við sínar kappingar, men børnini eru eftir. TSF skipar í næstum fyri FM í landavegsúkkling fyri børn. Gongst sum ætlað verður kappingin leygardagin 30. september.

Sum sagt er kappinarárið hjá teimum vaksnu liðugt, men eftirsum 2007 er eitt sokallað "Oyggjaleikaár" heldur venjingin fram.

Nevnd og venjarar fara í felag at leggja eina ætlan fyri veturin, og er ætlanin sjálvandi, at umframt miðvísa venjing, so verða kappingar eisini á skránni.

Vetraskráin verður í næstum kunnað á heimasíðuni hjá felagnum, www.tsf.fo.



# Torkil setti allar uppá pláss

**Fríggjakvøldið var kappast í FM í einkultstarti í súkkling. Ungi Torkil Veyhe hevði ein góðan dag og vant tí burturúr hinum súkklarunum.**

SÚKKLING
*Tíðindaskriv*

Tórshavnar Súkklufelag skipaði í vikuskiftinum fyri FM í einkultstarti og landavegkoyring.

Fríggjakvøldið varð kappast í einkultstarti. Teinurin var 40 km langur og koyrt varð frá Kollafirði til rundkoyringina við Streymin og aftur til Kollafjørð.

Fitt av vindi var, og hetta ávirkaði úrslitið hjá flestu súkklarunum, men ikki øllum. Ikki Torkil, sum allarhelst koyrdi sín besta einkultstart higartil. Hann var í einum klassa fyri seg fríggjakvøldið og vann hann við meira enn tveimum minuttum á nummar tvey.

Hann koyrdi teir 40 kilometrarnar uppá ein tíma og ein minutt, og tað gevur eina meðalferð sum er beint undir 40 km/t.

Eitt frálíkt úrslit hjá einum so ungum súkklara, og verður gongdin sum hon hevur verið higartil, er Torkil allarhelst eitt gott boð upp á ein av manningini sum skal manna føroyska landsliðið komandi summar, tá Oyggjaleikir verða á Rhodos.

Úrslitið hjá Torkil var sum sagt sera gott. Tað sama kann sigast um avrikið hjá Súsonnu Skylv Sørensen. Hon koyrdi teir 40 kilometrararnar uppá ein tíma 19 minuttir, og gevur tað eina miðalferð beint yvir 30 km/t.